GÍ-KÍ 1-3 (0-1):

# KÍ sera vandamikið í deyðbóltsstøðum

**Støðið var ikki tað, sum gøtumenn og klaksvíkingar ofta hava víst, men klaksvíkingar vunnu, tí teir fingu fulla nyttu burturúr tveimum hornaspørkum og einum frísparki**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað hevur ikki verið so ofta tey seinnu árini, at klaksvíkingar eru farnir úr Gøtu við fullari úrtøku. Tað fóru teir sunnudagin, og tað er væl skiljandi, at lagið var gott. Eftir trilvandi fyrstu umførini hevur KÍ seinastu vikurnar havt undanvind. Og hesa ferð var sigurin serliga søtur, tí hann var tann fyrsti á útivølli, og hann varð vunnin á einum av liðunum, sum tað altíð verður roknað við – ikki minst í Sarpigerði.

Men rætt skal vera rætt. GÍ er ikki tað, sum GÍ var í stórtíðini í níti árunum. Og GÍ er heldur ikki tað, sum GÍ var í fjør, tá teir undan summarsteðginum vunnu hvørja ferð og endaðu á silvurplássinum.

Miðvallarspælið var ikki sannførandi. Sámal Joensen og Magni Jarnskor, sum hava verið eyðkendir fyri at vera serliga arbeiðssamir, soleiðis at teir sum oftast hava verið yvir við yvirlutan ímóti beinleiðis mótstøðumonnunum. Hetta hevur oftast havt við sær, at GÍ miðvøllurin hevur verið fyrsta sterka verjuketan, og at GÍ miðvøllurin hevur verið sera vandamikil í álopspartinum – í persónligum gjøgnumbrotum, við langskotum, innleggum og fríspælingum av fremstu monnunum.

Einki av hesum sást nakað serligt til ímóti KÍ. Serliga bilaði tað í álopspartinum. Tær ferðirnar, sum Súni Fríði Johannesen og ein merkiliga tamur Súni Olsen vórðu spældir leysir, kunnu meiri enn so teljast á aðrari hondini, og tað var ikki fyrrenn ein tími var farin, at Meinhardt Joensen í KÍ málinum fekk fyrstu beinleiðis royndina ímóti sær. Tað sigur ikki so lítið, at GÍ einki hornaspark hevði í 1. hálvleiki.

Á hagtølunum sæst, at tað eru miðverjin Bartal Eliasen og miðvallarin Sámal Joensen, sum hava skotið málini hjá GÍ. Tá KÍ var komið framum 3–0, fór Bartal fram at spæla. Tað órógvaði KÍ verjuna, og Súni Fríði Johannesen minkaði um munin aðru ferðina, tá hann varð spældur leysur. Fyrru ferðina – tá heilfluktaði Súni Fríði úr stuttari fjarstøðu eftir innlegg úr høgru– stór-bjargaði KÍ málverjin til horna. Málið kom eftir hornaspark úr vinstru, sum Poul Ennigarð stútaði niður til álopsmannin.

Tá ið GÍ hevði minkað um munin, tóktist tað sum um, at eitt sindur av fjáltri kom á KÍ liðið, sum eina løtu skinklaði og ikki var sannførandi skipað. Men so varð Bartal skaddur í samanbresti við KÍ málverjan, GÍ verjuspælarin noyddist at taka seg úr stríðnum, og síðstu tíggju minuttirnar var eingin ivi um, at KÍ fór at megna at halda tørn.




*KÍ vann triðja dystin upp í slag, tá teir vitjaðu í Gøtu, og nú man optimisman so spakuliga aftur fara at ráða í Klaksvík, har fótbóltsstoltleikin tey bæði seinastu árini annars hevur verið á einum hampuliga lágum støði*

*Mynd: Samson Nesá*

## Deyðu bóltarnir

KÍ hevði størri tyngd í álopspartinum. Í 1. hálvleiki var fleiri ferðir um reppið, at sera arbeiðssami Hjalgrím Elttør, Kurt Mørkøre og Bárður á Lakjuni fingu hol á, eftir at teir fóru komnir í brotsteigin, men tað eydnaðist ikki teimum at spæla seg til nakað mál.

KÍ hevur tær seinastu ferðirnar spælt við mest sum sama liðið. Tað er í sær sjálvum ein fyrimunur. Bárður á Lakjuni, sum fyrsta partin av kappingini tóktist leysur í saðlinum, hevur fingið nógva spælitíð. Tað hevur styrkt um sjálvsálitið hjá honum, og serliga í hornasparksstøðunum hevur hann verið vandamikil.

Allan Joensen er av góðum grundum ikki í fullgóðari venjing enn, men tað er ein stórur styrkur, at hann er komin aftur á miðvøllin, har hann vinnur nógv, spælir skilagott frá sær og megnar at fara framvið einum og tveimum monnum og at hótta við skoti.

Harley Bertholdsen hevur ikki verið fastur maður síðstu ferðirnar. Hesa ferð var Allan Mørkøre burturstaddur, og so var Harley á miðvøllinum í høgru, meðan Atli Danielsen var vongverji aftanfyri.

Øll KÍ málini vórðu skorað í sambandi við deyðbóltsstøður. Harley Bertholdsen átti í 1. hálvleiki síðsta fótin á dygst undir málinum, eftir at Bárður á Lakjuni hevði sent hornaspark innfyri úr vinstru, og Ove Nysted hevði snittað víðari.

Ove Nysted økti knappar tíggju minuttir eftir steðgin. Aftur sendi Bárður á Lakjuni hornaspark til nærra stólpan, og hesa ferð var Ove nógv hægstur og drønstútaði dygst inn við samankomingini. Og bara ein minuttur var farin afturat, tá Harley Bertholdsen økti til 3–0. Rúni Elttør sendi frá miðstrikuni í vinstru fríspark 70 metrar! diagonalt. Bólturin sigldi omanfyri allar í brotsteiginum, og so smekkaði Harley til, og tað sang í nettakinum. Ein fínt mál.

GÍ royndi at stríða seg uppí aftur. Men tað var trupult. Spælið var hugflogsfátækt. Ove Nysted vann allar teir nógvu og høgu bóltarnar, sum vórðu sendir fram á KÍ helvtina, og Alexander Djordjevic var eisini sannførandi í miðverjuni.

Ikki so fáir klaksvíkingar vóru við sínum liði í Gøtu. Og ivaleyst vóru teir heilt nógvir, sum iðraðu seg um, at teir ikki fóru um fjørðin hesa ferð!

## Dysturin í tølum

**GÍ-KÍ 1-3 (0-1)**

0-1: Harley Bertholdsen, 13
0-2: Ove Nysted, 54
0-3: Harley Bertholdsen, 56
1-3: Súni Fríði Johannesen, 76
Dómari: Dagfinn Olsen

GÍ: Hallur Hansen – Hans Pauli Petersen, Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Leivur Hansen – Magni Jarnskor, Sámal Joensen, Zdzislaw Janik, Áslakur R. Petersen – Súni Fríði Johannesen, Súni Olsen
KÍ: Meinhardt Joensen – Atli Danielsen, Ove Nysted, Alexander Djordjevic, Rúni Elttør – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Allan Joensen, Hjalgrím Elttør – Kurt Mørkøre, Bárður á Lakjuni



B36-EB/STreymur 7-2 (1-1):

# Ein hálvleikur var nokk



*Bárður Mortansson var hesa ferð fremsta val í B36-álopinum, og hann takkaði fyri álitið við at skjóta tvey av teimum sjey málunum hjá heimaliðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Sorin Anghel var einsamallur á toppinum hjá gestunum, og umframt at vera við í báðum málunum var hann serliga í fyrra hálvleiki ein stór hóttan móti B36-malinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**EB/Streymur hevði sera gott tak á B36 fyri steðgin, men teir máttu at enda taka til takkar við stórtapi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

B36 vóru risa favorittar at vinna dystin, tá teir sunnudagin tóku ímóti EB/Streymi, sum var komið til Havnar á vitjan.

Fyrstu løtuna av dystinum var eisini líkt til, at meistararnir skuldu liva upp til favorittheitið, og tað var eisini skjótt, at John Petersen hevði lagt árstalsfelagið á odda.

## Sovnaðu

Skjóta málið skuldi tó vísa seg at verða eitt slag av sovikodda hjá B36. Í øllum førum tóktust teir meira ella minni at halda, at sigurin nú fór at koma av sær sjálvum, og ferðin á spælinum varð eisini hareftir.

EB/Streymur hevði tó á ongan hátt givið skarvin yvir, og spakuliga vóru tað teir, sum arbeiddu seg inn í dystin. Lykilin til hetta var fyrst og fremst ein væl skipaður miðvøllur, har Ronnie Samuelsen og Jákup Martin Joensen stýrdu tí mesta, og tó at Sorin Anghel í útgangsstøðnum var einsamallur á toppinum, so varð hann væl stuðlaður av miðvøllinum, tá spælið varð flutt niðaneftir.

Og tað hendi seg meira enn so, at gestirnir komu oman móti brotsteiginum hjá B36. Kanska ikki so, at teir stóru málmøguleikarnir vórðu skaptir, men teir komu væl ígjøgnum úti í borðunum, og tað tóktist bert vera ein spurningur um tíð, áðrenn teir javnaðu.

Hetta hendi eisini, tá einir tíggju minuttir vóru eftir av hálvleikinum. Jákup Martin Joensen royndi at dekka bóltin inni í brotsteiginum, tá Kenneth Jacobsen púrasta óneyðugt tók beinini undan honum, og dómarin var ivaleysur, tá hann peikaði á brotssparksblettin. Sorin Anghel varð settur at skjóta, og ósvikaliga trygt sendi hann bóltin netið.

Og at gestirnir ikki fingu fleiri mál enn hetta eina undan steðginum, kunnu teir mest takka sær sjálvum fyri. Sorin hevði sjálvur gyltan møguleika, tá hann sendi beint á málverjan eftir at hava drigið fram við Jens Kristiani Hansen, og í fleiri øðrum førum var tað bert seinasta sendingin, sum restaði, fyrr enn leikarar gjørdist púrasta leysir.

## Alt punkteraði

Tá lið fer so langt niður í gear, sum B36 gjørdi sunnudagin, so er tað oftani soleiðis, at tað er sera torført at toga seg uppaftur, og tí var tað ikki sørt, at roykurin av eini sensatión hekk yvir vøllin í hálvleikssteðginum.

EB/Streymur hevði sum fyrri hálvleikurin leið verið alt meira dominerandi á vøllinuim, men tað var tó skjótt greitt, at B36 leikararnir høvdu fingið nøkur stór orð oman yvir seg í steðginum.

Alt fyri eitt settu teir seg nú á dystin, og so líðandi byrjaðu størri og smáir málmøguleikar eisini at íkoma. Men tað skuldi eitt lítið mistak til, áðrenn B36 veruliga fekk hol á.

Magni á Lakjuni varð leiktur mest sum fríur vinstrumegin í brotsteiginum. Skotið var mest sum hálvkiksað, men Gunnar á Steig fekk ikki hildið bóltinum, og so sýndi Tórálvur Poulsen, hvussu ein rættur áleypari hugsar, tá hann var fyrstur á returinum og smekkaði til í málið.

Og so skrædnaði veruliga hjá E/Streymi. Organisatiónin á liðnum, sum hevði verið hampuliga góð fram til hetta, fór fullkomuliga í fisk, og eftir trimum minuttum var støðan broytt til 4-1. Fyrst tá Bárður Mortansson fylgdi upp, eftir at bólturin fyrst hevði á tvørtrænum, og síðani tá Magni og Jens Kristian hegnisliga spældu seg ígjøgnum, so Magni at enda kundi senda framvið málverjanum

Við 4-1 var dysturin væl og virðiliga avgjørdur, og seinastu tíðna minti alt mest um okkurt slag av venjingardysti, har leikarar av ótta fyri skaðum ikki vilja geva seg tey seinastu prosentini í nærdystunum. Nakað sum ofta viðførir, at verjurnar gerast dekan ov leysar, og so varð eisini.

Magni økti til 5-1, áðrenn Vinjard Dam eftir sera flott gjøgnumbrot hjá Sorin Anghel minkaði um munin, og at enda staðfestu John Petersen og Bárður Mortansson. Í báðum førum eftir gjøgnumspæl fram til málteigin.

## Fara at lyfta sær

Við sigrinum fekk B36 í øllum førum rist keðiliga tapið fyri viku síðani av sær, men hóast greiðu tølini, so var avrikið als ikki serliga sannførandi. Serstakliga í fyrra hálvleiki sýndi liðið veikleikar. Bæði tí at ferðin var í lág í framrættaða spælinum, og tí skipanin av liðnum als ikki var í lagi, tá mótstøðumenninir kontraðu.

Fyri EB/Streym mundi stórtapið koma við eini heldur løgnari kenslu, og í veruleikanum høvdu teiri eisini betri uppiborið.

At B36 hevði somikið stórar trupulleikar í fyrra hálvleiki var nevnliga fyrst og fremst EB/Streymi fyri at takka. Taktiska skipanin á liðnum var góð, og við eitt lítið sindur av hepni vóru teir eisini á odda í steðginum.

Enn er liðið tó partur av botnstríðnum, men megna teir í samfullar 90 minuttir at halda høvdið kalt, og ikki fara í upploysn, tá alt ikki gongst eftir vild, er einki at ivast í, at liðið verður eins trygt omanfyri strikuna, sum teir vóru tað í fjør. Men sum sagt, so krevur tað, at dysturin verður leiktur á tamb, og ikki bara helvtina av tíðini.

## B36-EB/Streymur 7-2 (1-1)

1-0: John Petersen, 7
1-1: Sorin Anghel (br.), 36
2-1: Tórálvur Poulsen, 63
3-1: Bárður Mortansson, 65
4-1: Magni á Lakjuni, 66
5-1: Magni á Lakjuni, 70
5-2: Vinjard Dam, 74
6-2: John Petersen, 76
7-2: Bárður Mortansson, 84
Dómari: Eiler Rasmussen: Í longum løtum var dysturin av tí meira linliga slagnum, og dómarin gjørdi sær ongan tíð uppgávuna óneyðuga torføra.

B36: Rene Tórgarð - Arnbjørn Danielsen, Egil Zachariasen, Fróði Clementsen – Kenneth Jacobsen, Jákup á Borg, Klæmint Matrasn, John Petersen, Jens Kristian Hansen – Bárður Mortansson, Tórálvur Poulsen
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Esmar Eiðisgarð, Knút V. Vesturtún, Andrzej Pacek, Marni Djurhuus – Hans Pauli Samuelsen, Ronnie Samuelsen, Jákup Martin Joensen, Hallur Jacobsen, Teitur Joensen – Sorin Anghel